# Kunngerðablaðið A

2009 Hefti 29

ISSN 0907-905X


Nr. 136 — 3. november 2009

**Kunngerð**
**um**
**ALS-gjald**

Við heimild í § 9, stk. 2 og 4 og § 11 í løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 75 frá 25. mai 2009, verður ásett:

**§ 1.** Tað í § 9, stk. 1 í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing nevnda ALS-gjald er 1,00 %.

**§ 2.** Undir aðrar skattskyldugar almannaveitingar sambært § 8, nr. 2 í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, koma m.a. avlamisveiting og barnapeningur.
*Stk. 2.* Inntøkur sambært § 8, nr. 2 og 3 í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, sleppa undan gjaldsskyldu frá tí degi, Arbeiðsloysisskipanin hevur fingið skrivliga fráboðan um hesar.

**§ 3.** Áðrenn inntøka, sum ALS-gjald skal roknast av, sambært § 8 í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, verður útgoldin persóni, sum er gjaldsskyldugur sambært § 7, nr. 1 í nevndu lóg, skal ALS-gjaldið avroknast gjøgnum eitt av landsstýrinum góðkendum stað til avrokning av lønum. Avrokningarstaðið avroknar ALS-gjaldið til Arbeiðsloysisskipanina.
*Stk. 2.* Tá A-inntøka verður rindað av gjaldsskyldugum sambært § 7, nr. 2 í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, skulu hesi avrokna sín part av ALS-gjaldinum til Arbeiðsloysisskipanina sambært øðrum av fylgjandi inngjaldingarháttum:
1) Við at geva Arbeiðsloysisskipanini fulltrú til at taka ALS-gjaldið av peningastovnskonto hjá viðkomandi.
2) Við at rinda ALS-gjaldið eftir rokning frá Arbeiðsloysisskipanini. Rokning fyri ALS-gjald frá Arbeiðsloysisskipanini skal gjaldast innan 7 dagar eftir, at Arbeiðsloysisskipanin hevur sent rokningina.

*Stk. 3.* Teir arbeiðsgevarar, sum velja at rinda eftir rokning sambært stk. 2, nr. 2, skulu rinda eitt avgreiðslugjald á kr. 100 fyri hvørja rokning.

**§ 4.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi kunngerð frá stýrinum fyri ALS um gjald til Arbeiðsloysisskipanina, dagfest 26. november 1999, og kunngerð frá stýrinum fyri ALS um broyting av ALS-gjaldinum, dagfest 17. juni 2004.

Vinnumálaráðið, tann 3. november 2009

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/Arne Poulsen (sign.)

Nr. 137 3. november 2009

**Kunngerð**
**um**
**arbeiðsloysistrygging fyri sjálvstøðug vinnurekandi**

Við heimild í § 12, stk. 2 og 6 í løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 75 frá 25. mai 2009, verður ásett:

*Rætt at tekna trygging*

**§ 1.** Rætt at tekna sjálvbodna trygging sum sjálvstøðugt vinnurekandi hevur tann, sum:

1) hevur bústað í Føroyum, og
2) hevur inntøku frá persónligum arbeiði sum sjálvstøðugur vinnurekandi.

*Sjálvstøðug vinna*

**§ 2.** Sjálvstøðugur vinnurekandi er persónur, sum rekur vinnu fyri egna rokning og ábyrgd, hevur tað sjálvstøðuga vinnuvirksemið sum høvuðsvinnu og við tí endamáli at fáa fíggjarligan vinning.

*Stk. 2.* Arbeiðsloysisskipanin ger nágreiniliga meting av, um vinnan er sjálvstøðug. Sum meginregla er talan um sjálvstøðuga vinnu, tá ið tann vinnurekandi:

Hevur fólk í starvi, hevur skattafrádrátt fyri rakstrarútreiðslur og avskrivingar av rakstrargøgnum sambært reglunum fyri sjálvstøðugt vinnurekandi, og verður skattaður av yvir-/undirskoti av virkinum, er mvg-skrásettur, ella er íognari í íognarfelag.

*Upptøka - skjalprógv*

**§ 3.** Trygging kann teknast frá tí degi, tann vinnurekandi veruliga er farin undir sjálvstøðuga vinnu. Í sambandi við umsóknina skal tann vinnurekandi vátta at lúka treytirnar í §§ 1 og 2. Arbeiðsloysisskipanin kann krevja prógv fyri hesum.

*Stk. 2.* Tryggingin kann í fyrsta lagi fáa gildi frá tí degi, Arbeiðsloysisskipanin hevur fingið skrivliga umsókn. Tann vinnurekandi skal harumframt fylla út og undirskriva serligt umsóknarblað frá Arbeiðsloysisskipanini.

*Stk. 3.* Umsóknarblaðið við neyðugum upplýsingum skal vera Arbeiðsloysisskipanini í hendi í seinasta lagi 14 dagar eftir, at tann vinnurekandi hevur biðið um upptøkuna. Annars fellur umsóknin um upptøku burtur.

*Stk. 4.* Arbeiðsloysisskipanin kann í serligum førum víkja frá freistini, nevnd í stk. 3.

*Inngjald*

**§ 4.** Gjaldið til tryggingina er kr. 3.000,- árliga.

*Stk. 2.* Gjaldið verður rindað Arbeiðsloysisskipanini árliga frammanundan. Gjaldast skal fyrstu ferð, samstundis sum tryggingin verður teknað, og verður síðani rindað Arbeiðsloysisskipanini einaferð árliga eftir uppkravi.

*Stk. 3.* Er tryggingartakari í eftirstøðu, og Arbeiðsloysisskipanin hevur sent viðkomandi áminning við boðum um, at tryggingin fer úr gildi, um eftirstøðan ikki er goldin innan 14 dagar eftir, at áminningin er send, og eftirstøðan framvegis ikki er goldin, fer tryggingin úr gildi.

*Stk. 4.* Arbeiðsloysisskipanin kann krevja, at upplýsingarnar í hesi grein skulu váttast av løggildum ella skrásettum grannskoðara.

*Stk. 5.* ALS-gjøld sambært hesi grein kunnu krevjast inn við panting.

*Uppathald av sjálvstøðugum vinnuvirksemi*

**§ 5.** Tann, ið er tryggjaður sum sjálvstøðugur vinnurekandi, verður mettur at vera arbeiðsleysur, tá ið persónliga arbeiði hansara í virkinum er hildið uppat meira enn bráðfeingis, og hann er frámeldaður almennum skráum sum sjálvstøðugur vinnurekandi, uttan so, at framhaldandi skrásetingin ikki kemst av framhaldandi vinnu sum sjálvstøðugur vinnurekandi.

**§ 6.** Tað persónliga arbeiðið sum sjálvstøðugur vinnurekandi verður mett at vera hildið uppat meira enn bráðfeingis, tá ið skjalprógvað verður, at vinnuvirkið er endaliga avhendað, ella virksemið er endaliga steðgað.

*Stk. 2.* Vinnuvirksemið kann verða mett uppathildið innan endaliga avhending ella steðg, um tann vinnurekandi skjalprógvar at vera forðaður í framhaldandi at reka virkið.

*Stk. 3.* Verður vinnuvirkið selt á tvingsilssølu, kann tann vinnurekandi verða mettur at vera hildin uppat innan tvingsilssøluna, um so er, at skjalprógvað verður, at:

1) Áheitan um tvingsilssølu er latin fútarættinum,
2) vinnuvirkið er yvirtikið sum nýtiligt veð og/ella verður fyrisitið av veðhavara, og
3) vinnuvirkið verður rikið uttan hjálp frá tí vinnurekandi og/ella hjúnafelaga/sambúgva og/ella ómyndugum børnum.

Tað er somuleiðis ein treyt, at viðkomandi skrivliga váttar at fráboða Arbeiðsloysisskipanini, um broytingar eru í teimum í nr. 1-3 nevndu viðurskiftum, og tá vinnuvirkið er selt á tvingsilssølu.

*Stk. 4.* Viðkomandi lýkur ikki treytirnar í stk. 1-3, við at avhenda vinnuvirkið til hjúnafelaga/sambúgva og/ella ómyndug børn.

*Útgjald*

**§ 7.** Tryggingin skal hava verið í gildi samanhangandi í minsta lagi í 1 ár, áðrenn hin sjálvstøðugi vinnurekandi hevur rætt til útgjald.

*Stk. 2.* Tann tryggjaði hevur bert rætt til útgjald, um viðkomandi er tøkur á arbeiðsmarknaðinum sambært

§ 3 í kunngerðini um útgjald v.m. av arbeiðsloysisstuðli.

*Stk. 3.* Árligi arbeiðsloysisstuðulin er kr. 240.000 fyrstu 253 útgjaldsdagarnar og hereftir kr. 225.000. Frádrigin hesi upphædd verða tænastumannapensjónir, umframt aðrar líknandi eftirlønir, sum verða skattaðar sum A-inntøka, tó ikki fyritíðarpensjónir. Dagligi arbeiðsloysisstuðulin er í mesta lagi hægsti árligi arbeiðsloysisstuðulin, býttur við 253. Arbeiðsloysisstuðulin um tíman er í mesta lagi hægsti dagligi arbeiðsloysisstuðul, býttur við 8.

*Uppsøgn*

**§ 8.** Tann tryggjaði hevur rætt at siga upp tryggingina við einari uppsagnarfreist upp á ein mánað.

*Stk. 2.* Skrivlig uppsøgn skal vera Arbeiðsloysisskipanini í hendi seinast í mánaðinum frammanundan tí fyrsta, sum uppsagnarfreistin sambært stk. 1 byrjar.

*Reglur annars*

**§ 9.** Tann tryggjaði hevur skyldu at boða frá øllum broytingum í viðurskiftum hansara, sum kunnu ávirka tryggingarviðurskiftini, herundir sum kunnu broyta støðuna hjá viðkomandi sum sjálvstøðugt vinnurekandi.

**§ 10.** Tryggingar, ið eru teknaðar, áðrenn henda kunngerð er komin í gildi, koma undir reglurnar í hesi kunngerð dagin eftir, at hon er lýst.

**§ 11.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi kunngerð frá stýrinum fyri ALS um arbeiðsloysistrygging fyri sjálvstøðug vinnurekandi, dagfest 26. november 1999, við seinni broytingum.

Vinnumálaráðið, tann 3. november 2009

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/Arne Poulsen (sign.)

## Kunngerð um broyting í kunngerð um sjúkufyribyrgjandi rakstur í alibrúkum

### § 1

Í kunngerð nr. 134 frá 16. oktober 2009 um sjúkufyribyrgjandi rakstur av alibrúkum, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 65, stk. 1, nr. 2) verður „mánaðir" broytt til „2 mánaðir".

2) Í fylgiskjali 5 verður „VI  Smoltstøðir á vatni" broytt til „IV Smoltstøðir á vatni."

### § 2

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Vinnumálaráðið, 9. november 2009

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/Arne Poulsen (sign.)

# Uppskot

# til

# eykajáttanarløgtingslóg fyri september 2009

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

# § 2. Løgmansfyrisitingin

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 290 | 290 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |
| **Landsstýrið** | | **290** | **-** |
| 2.12.3. Landsstýrið............................................. | | 290 | - |

## B. Játtanir

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |

### 2.12.3. Landsstýrið

| | | | |
|---|---|---|---|
| 12.3.01. Løgmaður og landsstýrið (Rakstrarj.) | J: | 6.630 | - |
| | **EYJ:** | **290** | **-** |

# § 3. Fíggjarmál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 22.250 | 28.250 | 6.000 |
| Løgu ætlan | - | - | - |
| **Felagsútreiðslur** | | **-250** | **-** |
| 3.11.1. Fyrisiting............................................. | | -250 | - |
| **Fíggjarmál o.a.** | | **500** | **-** |
| 3.15.1. Fíggjafyrisiting v.m............................................. | | 500 | - |
| **Almannamál** | | **2.000** | **-** |
| 3.21.2. Útgjaldsskipanir............................................. | | 2.000 | - |
| **Íbúðarmál** | | **25.000** | **6.000** |
| 3.22.4. Útgjaldsskipanir............................................. | | 25.000 | 6.000 |
| **Útbúgving og gransking** | | **1.000** | **-** |
| 3.23.2. Fólkaskúlin v.m............................................. | | 1.000 | - |

## B. Játtanir

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |

### 3.11.1. Fyrisiting

| | | | |
|---|---|---|---|
| 11.1.03. Fíggjarmálaráðið (Rakstrarj.) | J: | 9.067 | - |
| | **EYJ:** | **-250** | **-** |

### 3.15.1. Fíggjafyrisiting v.m.

| | | | |
|---|---|---|---|
| 15.1.04. TAKS (Rakstrarj.) | J: | 66.710 | - |
| | **EYJ:** | **850** | **-** |
| 15.1.13. Búskaparráðið (Rakstrarj.) | J: | 782 | - |
| | **EYJ:** | **-350** | **-** |

### 3.21.2. Útgjaldsskipanir

| | | | |
|---|---|---|---|
| 21.2.01. Stuðul til flutning og dupult húsarhald (Lógarbundin j.) | J: | 16.500 | - |
| | **EYJ:** | **2.000** | **-** |

### 3.22.4. Útgjaldsskipanir

| | | | |
|---|---|---|---|
| 22.4.01. Stuðul til rentuútreiðslur (Lógarbundin j.) | J: | 147.000 | 48.000 |
| | **EYJ:** | **20.000** | **6.000** |
| 22.4.04. Stuðul til bygging og umvæling av egnum bústaði | J: | 20.000 | - |
| | **EYJ:** | **5.000** | **-** |

### 3.23.2. Fólkaskúlin v.m.

| | | | |
|---|---|---|---|
| 23.2.07. Læraraeftirlønir (Lógarbundin j.) | J: | 48.000 | - |
| | **EYJ:** | **1.000** | **-** |

# § 5. Fiskivinnumál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 17.150 | 17.150 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |
| **Felagsútreiðslur** | | **-100** | **-** |
| 5.11.1. Fyrisiting............................................... | | -100 | - |
| **Tilbúgving** | | **-850** | **-** |
| 5.31.1. Tilbúgving............................................... | | -850 | - |
| **Fiskivinna** | | **18.100** | **-** |
| 5.34.1. Ymsar útreiðslur............................................... | | 100 | - |
| 5.34.4. Studningur til vinnur............................................... | | 18.000 | - |

## B. Játtanir

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **5.11.1. Fyrisiting** | | | |
| 11.1.05. Fiskimálaráðið (Rakstrarj.) | J: | 15.133 | - |
| | **EYJ:** | **-100** | **-** |
| **5.31.1. Tilbúgving** | | | |
| 31.1.07. Veðurtænastan (Rakstrarj.) | J: | 3.750 | - |
| | **EYJ:** | **-850** | **-** |
| **5.34.1. Ymsar útreiðslur** | | | |
| 34.1.04. Upplýsing um grind (Rakstrarj.) | J: | 325 | - |
| | **EYJ:** | **100** | **-** |
| **5.34.4. Studningur til vinnur** | | | |
| 34.4.01. Inntøkutrygd hjá fiskimonnum (Lógarbundin j.) | J: | 24.000 | - |
| | **EYJ:** | **18.000** | **-** |

# § 6. Vinnumál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -1.200 | -1.200 | - |
| Løgu ætlan | 1.200 | 1.200 | - |
| **Ráevnisvinna** | | **-200** | **-** |
| 6.32.1. Fyrisiting............................................... | | -200 | - |
| **Handil og vinna annars** | | **200** | **-** |
| 6.37.1. Ymsar útreiðslur............................................... | | 1.100 | - |
| 6.37.2. Ymiskur studningur............................................... | | -900 | - |
| **Samferðsla og samskifti** | | **-** | **-** |
| 6.38.2. Samferðsla............................................... | | - | - |

## B. Játtanir

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **6.32.1. Fyrisiting** | | | |
| 32.1.03. Jarðfeingi (Rakstrarj.) | J: | 17.403 | - |
| | **EYJ:** | **-200** | **-** |
| **6.37.1. Ymsar útreiðslur** | | | |
| 37.1.08. Loyvisnevndin (Rakstrarj.) | J: | 100 | - |
| | **EYJ:** | **100** | **-** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 37.1.17. Kappingarráðið (Rakstrarj.) | J: | 1.708 | - |
| | **EYJ:** | **200** | **-** |
| 37.1.18. Skráseting Føroya (Rakstrarj.) | J: | 1.197 | - |
| | **EYJ:** | **800** | **-** |

### 6.37.2. Ymiskur studningur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 37.2.04. Endurgjald til skipasmíð | J: | 1.400 | - |
| | **EYJ:** | **-900** | **-** |

### 6.38.2. Samferðsla

| | | | |
|---|---|---|---|
| 38.2.01. Strandfaraskip landsins (Landsf.) | J: | 118.403 | - |
| | **EYJ:** | **-1.200** | **-** |
| 38.2.02. Strandfaraskip landsins (Løguj.) | J: | 5.350 | - |
| | **EYJ:** | **1.200** | **-** |

## C. Átekning

**Nr. 3** Høvuðskonta 6.38.2.02. Strandfaraskip landsins (Løgujáttan)

Landsstýrismanninum verður heimilað at gera sáttmála um umvæling av M/S Ternuni og M/S Rituni fyri 9,4 mió. kr.

# § 7. Mentamál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 5.660 | 5.660 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |
| **Felagsútreiðslur** | | **90** | **-** |
| 7.11.1. Fyrisiting............................................... | | 90 | - |
| **Útbúgving og gransking** | | **5.620** | **-** |
| 7.23.6. Hægri útbúgvingar og | | 620 | - |
| 7.23.7. Lestrarstuðul............................................... | | 5.000 | - |
| **Mentan** | | **-50** | **-** |
| 7.24.1. Ymsar útreiðslur............................................... | | - | - |
| 7.24.2. Skapandi og útinnandi | | 50 | - |
| 7.24.5. Kirkjan............................................... | | -100 | - |

## B. Játtanir

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |

### 7.11.1. Fyrisiting

| | | | |
|---|---|---|---|
| 11.1.49. ES-samstarv (Rakstrarj.) | J: | 550 | - |
| | **EYJ:** | **90** | **-** |

### 7.23.6. Hægri útbúgvingar og gransking

| | | | |
|---|---|---|---|
| 23.6.04. Klaksvíkar sjómansskúli (Rakstrarj.) | J: | 3.403 | - |
| | **EYJ:** | **620** | **-** |

### 7.23.7. Lestrarstuðul

| | | | |
|---|---|---|---|
| 23.7.04. Lestrarstudningur (Lógarbundin j.) | J: | 97.891 | 10.500 |
| | **EYJ:** | **5.000** | **-** |

### 7.24.2. Skapandi og útinnandi virksemi

| | | | |
|---|---|---|---|
| 24.2.05. Umsiting av Mentanargrunninum (Rakstrarj.) | J: | 373 | - |
| | **EYJ:** | **50** | **-** |

### 7.24.5. Kirkjan

| | | | |
|---|---|---|---|
| 24.5.02. Føroysk sjómanskirkja | J: | 500 | - |
| | **EYJ:** | **-100** | **-** |

# § 11. Heilsumál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 23.250 | 23.250 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| **Heilsumál** | **23.250** | **-** |
| 11.20.1. Fyribyrging | 5.100 | - |
| 11.20.3. Sjúkrahúsverkið | 18.150 | - |

## B. Játtanir

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **11.20.1. Fyribyrging** | | | |
| 20.1.10. Koppsetingar (Lógarbundin j.) | J: | 6.825 | - |
| | **EYJ:** | **5.000** | **-** |
| 20.1.19. Læknakanningar av børnum (Lógarbundin j.) | J: | 600 | - |
| | **EYJ:** | **100** | **-** |
| **11.20.3. Sjúkrahúsverkið** | | | |
| 20.3.04. Landssjúkrahúsið (Rakstrarj.) | J: | 386.292 | - |
| | **EYJ:** | **8.150** | **-** |
| 20.3.20. Serviðgerð uttanlands (Rakstrarj.) | J: | 123.597 | - |
| | **EYJ:** | **10.000** | **-** |

# § 12. Almannamál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 13.650 | 13.250 | -400 |
| Løgu ætlan | - | - | - |

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| **Felagsútreiðslur** | **-400** | **-** |
| 12.11.1. Fyrisiting | -400 | - |
| **Almannamál** | **13.650** | **-400** |
| 12.21.1. Fyrisiting | -2.500 | - |
| 12.21.3. Barnastuðul | 4.400 | - |
| 12.21.4. Sjúkradagpeningur | -2.700 | -700 |
| 12.21.6. Eldri og brekað | 200 | - |
| 12.21.7. Sosialar skipanir | 8.200 | 300 |
| 12.21.8. Sosialar pensjónir | 6.050 | - |

## B. Játtanir

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **12.11.1. Fyrisiting** | | | |
| 11.1.26. Almannamálaráðið (Rakstrarj.) | J: | 10.617 | - |
| | **EYJ:** | **-400** | **-** |
| **12.21.1. Fyrisiting** | | | |
| 21.1.06. KT-heildarskipan til Almannastovuna (Rakstrarj.) | J: | 5.200 | - |
| | **EYJ:** | **-2.500** | **-** |
| **12.21.3. Barnastuðul** | | | |
| 21.3.04. Barnapeningur veittur í forskoti (Lógarbundin j.) | J: | 393 | - |
| | **EYJ:** | **1.700** | **-** |
| 21.3.06. Barnaískoyti (Lógarbundin j.) | J: | 5.913 | - |
| | **EYJ:** | **1.200** | **-** |
| 21.3.08. Børn og ung (Rakstrarj.) | J: | 40.817 | - |
| | **EYJ:** | **1.500** | **-** |

### 12.21.4. Sjúkradagpeningur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 21.4.01. Dagpeningaskipanin (Lógarbundin j.) | J: | 63.725 | 4.671 |
| | **EYJ:** | **-2.700** | **-700** |

### 12.21.6. Eldri og brekað

| | | | |
|---|---|---|---|
| 21.6.01. Serforsorg (Rakstrarj.) | J: | 144.057 | - |
| | **EYJ:** | **-400** | **-** |
| 21.6.10. Ansingarsamsýning (Lógarbundin j.) | J: | 15.202 | - |
| | **EYJ:** | **600** | **-** |

### 12.21.7. Sosialar skipanir

| | | | |
|---|---|---|---|
| 21.7.01. Vanlig forsorg (Lógarbundin j.) | J: | 159.692 | 4.588 |
| | **EYJ:** | **8.200** | **300** |

### 12.21.8. Sosialar pensjónir

| | | | |
|---|---|---|---|
| 21.8.01. Fólkapensjón (Lógarbundin j.) | J: | 401.079 | - |
| | **EYJ:** | **2.500** | **-** |
| 21.8.05. Fyritíðarpensjón (Lógarbundin j.) | J: | 252.185 | - |
| | **EYJ:** | **3.550** | **-** |

# § 15. Innlendismál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 2.050 | 2.050 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |
| **Lógarmál** | | **300** | **-** |
| 15.14.1. Ymiskar útreiðslur............................................... | | 300 | - |
| **Umhvørvi** | | **1.000** | **-** |
| 15.30.1. Umhvørvi............................................... | | 1.000 | - |
| **Handil og vinna annars** | | **300** | **-** |
| 15.37.4. Ognarskrásetingar............................................... | | 300 | - |
| **Samferðsla og samskifti** | | **450** | **-** |
| 15.38.1. Vegir og havnir............................................... | | 450 | - |

## B. Játtanir

Útr. Innt.
- Tús. kr. -

### 15.14.1. Ymiskar útreiðslur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 14.1.04. Føroya kærustovnur (Rakstrarj.) | J: | 4.797 | - |
| | **EYJ:** | **300** | **-** |

### 15.30.1. Umhvørvi

| | | | |
|---|---|---|---|
| 30.1.10. Spilloljureinsing .............................................................. | J: | 4.000 | - |
| | **EYJ:** | **1.000** | **-** |

### 15.37.4. Ognarskrásetingar

| | | | |
|---|---|---|---|
| 37.4.02. Umhvørvisstovan (Rakstrarj.) | J: | 19.333 | - |
| | **EYJ:** | **300** | **-** |

### 15.38.1. Vegir og havnir

| | | | |
|---|---|---|---|
| 38.1.18. Stuðul til infrakervið á útoyggjum | J: | 3.100 | - |
| | **EYJ:** | **450** | **-** |

Tórshavn, 11. november 2009

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

FØROYAPRENT